## Vilja ikki til Irak

USA hevur biðið Pakistan senda hermenn til Irak, men nú hevur pakistanska stjórnin svarað, at hon kann ikki senda hermenn hagar. Pakistanska stjórnin sigur í grundgevingunum, at hon kann ikki senda hermenn til Irak, tí tað er ov vandamikið. Hon vísir á, at fyri nøkrum døgum síðani vórðu tveir pakistanskir gíslar avrættaðir í Irak.

Eygleiðarar siga sambært Reuter, at avgerðin hjá stjórnini í Islamabad kemur amerikonsku stjórnini illa við. USA hevur leingi roynt at fáa muslimsk lond at senda hermenn til Irak, men bara Albania, Aserbajdsjan og Kasakhstan hava gingið áheitanini á møti. Tey hava sent tilsamans 250 hermenn til Irak.

Samstundis eru tekin um, at stuðulin til kríggið í Irak er minkandi. Ukraina hevur boðað frá, at landið fer at taka ein part av sínum 1.650 hermonnum úr Irak, og polska stjórnin hevur gjørt av, at helmingurin av teimum 2.400 polsku hermonnunum í Irak fara heim um stutta tíð.

## Kanna hava myrt 40 fólk

Týska ákæruvaldið hevur skuldsett ein sjúkrahjálpara fyri at hava beint fyri fleiri sjúklingum, og kanningarnar benda nú á, at sjúkrahjálparin hevur beint fyri millum 20 og 40 sjúklingum.

Tann 25 ára gamli maðurin hevur greitt løgregluni frá, at hann hjálpti sjúklingunum, tí tey liðu so illa. Hann hevur sagt, at í veruleikanum høvdu tey einki at liva fyri longur, og tí gav hann teimum so mikið av pínulinnandi og doyvandi evnum, at tey doyðu. Sjálvur ivast hann ikki í, at hann gjørdi eina góða gerð hvørja ferð, og tí sigur hann seg vera ósekan í øllum ákærum um morð.

Wolfgang Huber, sum arbeiðir hjá ákæruvaldinum í Bayern, sigur við DPA, at fólkini, sum fingu hjálp at doyggja, vóru ímillum 60 og 89 ár, og at tey øll liðu av álvarssomum sjúkum.

## Kanska fleiri krøv

Í Russlandi eru skattamyndugleikarnir farnir undir at kanna roknskapin hjá oljufelagnum Yukos fyri árið 2002, og tað hevur elvt til gitingar um, at felagið kann fáa eitt skattakrav afturat.

Higartil hevur skattavaldið kravt, at Yukos skal gjalda næstan 45 milliardir krónur í restskatti fyri árini 2000 og 2001. Av hesum stava 20 milliardir krónur frá 2000, og mánadagin fekk felagið boð um at gjalda pengarnar innan tveir mánaðir. Leiðslan í Yukos hevur boðað frá, at hon hevur ikki so nógvar pengar tøkar, og at felagið er heldur ikki ført fyri at læna teir. Felagið hevur tí gjørt greitt, at kann tað ikki gjalda skuldina yvir eitt ávíst áramál, fer fer tað á húsagang. Nógvir eygleiðarar halda, at málið er í veruleikanum ein politisk uppgerð ímillum Vladimir Putin, forseta og fyrrverandi stjóran í Yukos, ríkmannin Mikhail Khodorkovskij, sum hevur sitið í varðhaldi síðani seinasta heyst.

Úr Moskva ljóðar, at fyrrverandi kanadiski forsætisráðharrin Jean Chretien er biðin um at royna semju ímillum skattavaldið og Yukos.

## Kommunur finna saman

Síðani danska stjórnin herfyri boðaði frá einum nýggjum kommunubygnaði, hava meiri enn helmingurin av landsins kommunum samtykt at leggja saman í størri eindir.

Sambært tíðarritinum Danske Kommuner hava 121 kommunur gjørt av at leggja saman í 39 eindir. Hinvegin hava 15 av teimum størru kommununum samstundis boðað frá, at tær ætla sær at halda fram sum sjálvstøðugar kommunur. Nógv tær flestu av hesum kommununum eru á høvuðsstaðarleiðini, men tað eru eisini kommunur aðrastaðni, sum ikki hava áhuga í samanlegging. Teirra millum er Bornholm, sum nú er ein kommuna, og sum ikki hevur áhuga í samanlegging við kommunur inni á meginlandinum.

Samstundis sum kommunubygnaðurin skal broytast, verða amtini tikin av. Ístaðin fyri skal Danmark býtast sundur í fimm øki.

# Danmark fingið sítt Abu Ghraib

**Tann 37 ára gamla Annemette Hommel er skuldsett fyri at hava farið illa við irakskum fangum, men verji hennara sigur, at málið er nógv verri enn tað, sum higartil er komið fram**

FANGAVIÐFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Lynndie England á veg til avhoyringarnar í Fort Bragg týsdagin*

*Mynd: Reuters*

Fyrrakvøldið gjørdi danski verjumálaráðharrin, Søren Gade, av at boðsenda leiðsluni hjá donsku hermonnunum í Irak. Tann almenna orsøkin var, at ráðharrin hevði mist álitið á leiðsluni.

Samstundis er tann 37 ára gamla Annemette Hummel, sum er kapteynur í danska herinum, skuldsett fyri at hava brotið reglurnar um, hvussu krígsfangar skulu viðfarast. Í donsku fjølmiðlunum er komið fram, at hon noyddi irakskar fangar at sita í pínandi støðum, og at hon sýtti teimum vatn, tá teir bóðu um tað. Í báðum førum er talan um brot á altjóða reglur um krígsfangar.

Sjálv sigur Annemette Hummel við donsk bløð, at hennara yvirmenn í Irak vóru vitandi um, hvørja framferð hon hevði brúkt, og at teir høvdu góðtikið hana. Eitt nú sigur hon við BT og Ekstrablaðið, at ovastin hjá donsku hermonnunum í Irak, Henrik Flach, oberstur, hevði góðtikið tað, sum hon hevði gjørt.

Verjin hjá Annemette Hommel segði í gjár, at málið um donsku fangaviðferðina í Irak er eitt størri mál, enn fólk halda, og at tað versnar dag frá degi.

### Til stuttleika

Sama dag sum danska herleiðslan í Irak bleiv koyrd frá, fór ein dómstólur í USA undir at avhoyra ta 21 ára gomlu Lynndie England, sum er ákærd fyri at hava farið illa við fleiri irakskum fangum í Abu Ghraib-fongslinum.

Undir avhoyringunum í Fort Bragg segði hon, at hon og hinir hermenninir hildu seg ikki gera nakað skeivt, og tey hildu tað heldur ikki vera serliga álvarssamt. Tvørturímóti hildu tey tað vera stuttligt, segði hon. Undir avhoyringunum vildi eitt av vitnunum vera við, at fregnartænastan CIA visti, hvat fór fram, og at CIA hevði beinleiðis biðið fangavørðarnar fara illa við fang-unum.

Verjin hjá Lynndie England segði í gjár, at verður hon dømd, eiga nógvir aðrir hermenn og yvirmenn at verða revsaðir. Heilt upp til teir ovastu.

# Størri stættamunur í Bretlandi

**Tey ríku í Bretlandi eru vorðin munandi ríkari, síðani Tony Blair og arbeiðaraflokkurin komu til valdið í 1997**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bretska arbeiðarastjórnin eigur at leggja størri dent á sosialan javna og sosialt rættvísi.

Tað eru ráðini, sum stjórnin fær frá stovninum Public Policy Research, sum í einari nýggjari frágreiðing kemur til ta niðurstøðu, at tá tað snýr seg um sosialan javna, er politikkurin hjá stjórnini miseydnaður.

Stovnurin sigur, at tey sjey árini, Labour hevur sitið við valdið, er munurin á ríkum og fátækum vaksin í Bretlandi. Millum annað staðfestir frágreiðingin, at 10 prosent av teimum ríkastu bretunum fáa 54 prosent av teirri sokallaðu vælferðarkøkuni, og at tað ovasta prosentið fer við 13 prosentum av bruttotjóðarinntøkuni. Hesi tølini vóru minni, tá Labour kom til valdið.

Public Policy Research sigur, at javnstøðan ímillum menn og kvinnur er batnað í Bretlandi tey seinastu sjey árini, men kortini tjena kvinnur framvegis bara 82 prosent av tí, sum menn í tilsvarandi størvum forvinna.

Stjórnin fær kortini rós fyri at hava bøtt um korini hjá barnafamiljunum, hóast tey ikki eru nóg góð enn.



Poul Michelsen:

# Flogvøllurin í Vágum er óhóskandi

**– Tað er einki framtíðarperspektiv í flogvøllinum í Vágum, sigur Poul Michelsen, tingmaður fyri Fólkaflokkin**

FLOGVØLLUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Tað nýtist ikki vera á Glyvursnesi, men Poul Michelsen heldur framvegis ikki, at flogvøllurin í Vágum er óhóskandi*

Poul Michelsen var í sínari tíð fortalarin fyri at byggja ein flogvøll á Glyvursnesi. Tað ætlanirnar vóru síðani lagdar á hyllina, men fyrrverandi borgarstjórin í Havn og núverandi tingmaðurin fyri Fólkaflokkin hevur so avgjørt ikki broytt meining um, at tað er rætt at byggja flogvøll á Glyvursnesi – ella á øðrum stað.

Ì øllum førum er flogvøllurin í Vágum ótíðarhóskandi. Tað er einki framtíðarperspektiv í flogvøllinum í Vágum, sigur Poul Michelsen.

Hann kallar støðuna í Vágum at pressa fótin í skógvin, sum ikki passar.

Hann tekur støði, at løgmaður í sínari røðu tosaðu nógv um altjóðagerðing. Hana skulu vit taka sum ein avbjóðing.

– Tað nógva kjakið um fluttning loftvegis hevur víst okkum, at tørvar er á einum flogvølli í Føroyum við ongum avmarkingum. Vit eiga ikki at vera bangin fyri at tosa um hetta, sigur Poul Michelsen.

Ì viðgerðini av ólavsøkurøðuni hjá løgmanni hevði Poul Michelsen flogvallamálið á orði, men hann møtti harða mótstøðu frá Vága tingmonnnum.

Er tað ikki politiskt utopist at hugsa sær, at flogvøllurin ikki altíð fer at vera í Vágum?

– Tað er hóast alt nøkur onnur fólk, sum skulu liva í hesum samfelagnum, uttan tey tretivu arbeiðsplássini á flogvøllinum og atkvøður til tveir tingmenn í Vágum, sigur Poul Michelsen.

### 100 OK

Poul Michelsen kann væl liva við, at flogbreytin verður longd eini hundrað metrar sum eina fyribils loysn. Men í longdini heldur hann ikki, at hetta er nakað, føroyska samfelagið og vinnulívið kann liva við. Men verður flogvøllurin í Vágum longdur, so eru tað danir, ið eiga at rinda fyri hetta.

– Danir hava fingið okkum í hesa støðuna, og teir eiga flogvøllin, so tað er púra greitt, at teir eiga at rinda fyri sítt. Velja vit at byggja ein nýggjan flogvøll, so eru tað sjálvandi føroyingar, ið eiga at rinda, sigur Poul Michelsen.

### Einki víðari

Poul Michelsen er sum partur av tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum eisini partur av samgonguni. Í samgonguskjalinum stendur á ongan hátt nakað um, at flogvøllurin ikki skal vera í Vágum. Og Poul Michelsen ásannar eisini, at hann ikki fær farið víðari við málinum politiskt.

– Men eg kann fyri tí hava eina meining. Tað er ikki altíð, at ein politisk loysn loysir seg best fyri vinnuna og fyri samfelagið, sigur Poul Michelsen.

# Oljuprísurin er søguliga høgur



*Oljan undir Føroyum hevði farið fyri høgan prís í dag, um so var. Ikki síðani flógvakríggið hevur prísurin á olju verið eins høgur*

**Ráoljuprísurin er tann hægsti síðani flógvakríggið. Lági kursurin á dollarum kemur væl við hjá føroyingum**

OLJA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Prísurin á ráolju er søguliga høgur í løtuni. Prísurin hevur ikki verið eins høgur síðani Flógvakríggið fyri skjótt fjúrtan árum síðani. Og hetta setir eisini síni spor á støðuna hjá føroyska keyparanum. Á ólavsøku dýrkaði Føroya Shell um sínar prísir. Prísurin á bensin og diesel er í miðal hækkaður 13,5% síðani januar 2002. Prísurin ferðast upp og niður við alheimsprísinum. Men prísurin á brennievni hevði verið munandi hægri, var tað ikki fyri lága kursinum á dollaranum.

Spurningurin er hvørt høgi prísurin fer at halda sær?

– Tá mann er á hægsta prísi í fjúrtan ára, so er ringt at meta, og tú kundi ynskt, at prísurin gekk niðureftir. Men serliga ófriðurin í Russlandi og stóri eftirspurningurin ger, at tað í løtuni ikki røkist fyri, at oljuprísurin fer at halda verandi støði eina tíð afturat, sigur Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðari á Føroya Shell.

Hann sigur, at høgi oljuprísurin skyldast fleiri umstøðum. Òfriðurin við størsta oljufelagnum í Russlandi spælir ein týðandi leiklut.l Men eisini er eftirspurningurin í serliga Kina voksin nógv. órógv.

Prísurin fyri tunnuna er í skrivandi stund 40,64 dollara fyri tunnuna. Serfrøðingar hava torført við at siga nakað um, hvussu nógvur longur upp prísurin kann førka seg.

### Prísir á brennievni hjá Føroya Shell

| | januar 2002 | januar 2003 | januar 2004 | 28. juli 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Blýfrítt 95 (pr.ltr.) | | | | 7,39 |
| Blýfrítt 98 (pr.ltr.) | 6,96 | 7,44 | 7,19 | 7,83 |
| Diesel (pr.ltr.) | 4,45 | 4,90 | 4,65 | 5,10 |
| Gassolja (pr. 1.000 ltr.) | 3125,00 | 3725,00 | 3525,00 | 4088,00 |